# Nærri ein býr við havið, tess betri er hugurin til sang

**Hetta segði løgmaður Jóannes Eidesgaard millum annað, tá hann var ein av røðarunum á evnisdegi um tónleik í Hvalba um vikuskiftið. Smærri fyrilestrar og livandi tónleikur settu tónleikin í Suðuroynni í fokus leygardagin**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


*Jóannes Eidesgaard, løgmaður við á evnisdegi um tónleiki í Hvalba*

Leygardagin settu tónleikalærarar í Suðuroynni tónleikin á breddan við stórum evnisdegi í skúlanum í Hvalba. Ætlanin var at taka upp farna tíð, dagin í dag og ikki minst framtíðarútlitini innan tónleik.

Fitt av fólki hevði leitað sær í skúlan í Hvalba og millum áhoyrararnar - og eisini leikarar av og á - sást Martin Mouritsen, leiðari fyri Musikkskúlaskipanina.

Lagt var soleiðis tilrættis, at smærri fyrilestrar á umleið 10 minuttir vóru á skránni og so spældu ymsir bólkar livandi tónleik. Bæði næmingabólkar og bólkar við lærarum og tónleikarum.

Hesi spældu: Suðurættin, Oddur Hentze og hornnæmingar, klavernæmingar hjá Onnu-Kirstin Nilsson, Tvøroyrar Hornorkestur, Tróndur Enni er leiðari, Vágs Skúlaorkestur við Ulf Nordlund, Suðuroyar Gospelkór, Jens Knudsen er leiðari, Kór og klaver við Jens Mortan Mortensen og Suðurættin Sekstettin, tónleikalærarar við Brandi Enni á odda.

## Fyrilestrar

Fyrilestrahaldararnir umboðaðu ymsar bólkar í samfelagnum - nýtarar og njótarar av tónleiki. Elin Nielsen beyð vælkomin og leiddi áhoyrarar ígjøgnum skránna. Einar Larsen hugleiddi um tónleikasøguna í oynni. Anna Djurhuus umboðaði kommunurnar, Anna Kirstin Thomsen, vinnulív, Lars Djurhuus peningastovnin Suðuroyar Sparikassa, Heri Mortensen ítrótt og Nita Næs skúla.

Øll høvdu í felag eina vælvild fyri tónleikinum og greiddu fleiri eisini skemtiliga frá sínum fyrstu royndum við tónleiki, hvørt tað so var sum virkin tónleikari ella í undirvísingarstøðu. Frálíkar frásøgnir og metingar um for- og framtíð við tónleiki sum nýtsluvøru og til hugna.

## Hav og sangur

Síðsti røðarin var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ið umboðaði landspolitikkin. Løgmaður legði fyri við at minna á teori, sum sigur, at nærri ein býr við havið, tess størri er hugurin til sang. Og føroyingar hava havið kring seg og duga eisini óføra væl at syngja, segði løgmaður, og nevndi, at sangur er við til ymisk høvi sum náttúrligur partur av lívinum, bæði í gleði og sorg. Og ofta undrast útlendingar á stóra sangskattin, sum nærum øll tjóðin dugir uttan at hyggja í tekstblað.

Og løgmaður viðgekk, at tónleikurin fyllir nógv í hansara lívið og tá hann herfyri vitjaði í Liverpool, so var sera spennandi at vitja støðini, har bólkurin The Beatles ferðaðist. Og so komu fóbóltsvitjanirnar í aðru røð hjá einum, sum er vaksin upp við tónleikinum hjá The Beatles.

Og sum so mong fegnaðist løgmaður um tey mongu føroysku evnini, ið gera vart við seg uttanfyri landoddarnar. Og møguleikin fyri at tónleikurin gerst vunnugrein, var eisini frammi í røðu løgmans.

Jóannes Eidesgaard ásannaði, at evnini hava altíð verið millum fólk í Føroyum at spæla tónleik, men munurin er, at nú verður hetta stimbrað og tað ger mun og sæst aftur. Og so minti Jóannes Eidesgaard á, at tað at spæla tónleik fær nakað gott fram í menniskjum og stimbrar sosialt medvit.

Og fyrireikarar og áhoyrarar kundu fegnast um orð løgmans, tá hann segði seg vita, at tónleikur og musikkskúlaskipanin eiga so avgjørt hjartarúm hjá flestu politikarum.


*Einar Larsen hugleiddi um tónleikasøguna í oynni*


*Fleiri bólkar spældu á evnisdegnum*



# Hjálparforrit við føroyskari talu til sjónveik og blind veruleiki í ár

**Ein telduskipan, sum kann taka niður av netinum, scanna heilar bøkur inn og lesa tær upp, stava orðini hart og siga tær, hvat tú skrivar. Alt á føroyskum. Hetta verður veruleiki í ár, nú føroyska telduskipanin er um at vera liðug. - Hetta fer at hjálpa føroyskum blindum og sjónveikum nógv í gerandisdegnum, sigur Karin Kass. Føroysku Lions klubbarnir lótu sunnudagin eitt íkast á 100.000 kr til verkætlanina "Føroysk teldutala".**

FØROYSK TELDUTALA
*Eydna Skaale*


*Umboð fyri allar Lions Clubbarnar í Føroyum. Aftara rað frá vinstru: Jens Petur Brattalíð, Suðuroy, Àrni Svartafoss, Tórshavn, Regin Poulsen, Vágar, Poul Rustin, Eysturoy, Dánjal Ennistíg, Klaksvík, Fremst: Einar Larsen, økisformaður og Karin Kass, verkætlanin Føroysk Teldutala.*
*Mynd:Eydna Skaale*

– Tá Føroya Blindafelag søkti um stuðul til hesa verkætlanina, hugsaðu vit, at hetta var nakað, ið kundi gagna fólki úr øllum Føroyum, segði Einar Larsen, økisformaður í Lions, á lítlu samkomuni sunnudagin, har kekkurin á 100.000 kr varð handaður.

– Vit settu nøsina upp ímóti at fáa til vega 100.000 kr í felag, og tað málið er nú rokkið. Vit fáa nógvar umsóknir um stuðul árliga, men tað eru fáar, sum spenna so vítt og hjálpa so nógvum fólkum, sum hendan. Tí gleðir tað meg ótrúliga nógv at kunna hjálpa, segði Einar Larsen m.a., áðrenn hann gav Karini Kass, skrivara í blindafelagnum, orðið.

– Fyri fólk við vanligari sjón kann tað tykjast burturvið, at blind fólk skulu kunna nýta teldu. Men tað kunnu tey, og við hesum forritinum kunnu tey eisini gera tað á móðurmálinum, segði Karin Kass. Hon greiddi frá, at tey sjónveiku kunnu lesa á telduni við serliga stórum bókstavum og litkontrastum. Fyri teimum heilt blindu, kann teldan lesa hart, bæði bøkur, tíðindi, teldubrøv o.a. Karin Kass legði stóran dent á, hvussu nógv meiri sjálvstøðug tey blindu kunnu gerast av hesum forritinum. Serliga í hesum døgum, tá teldan er arbeiðsamboðið. Nú kunnu tey vera við aftur, segði hon.

– Íslendingar fingu sítt egna móðurmálsforrit í umleið 98’-99’. Vit hildu, at vit bara kundu tillaga tað íslendska forritið til føroyskt, men tað gekk ikki. Málini eru so mikið ymisk, at málserfrøðingarnir góvu upp, áðrenn nøkur roynd yvirhøvur varð gjørd. So gjørdu vit av at fara undir at gera eitt føroyskt forrit, segði Karin. Hon greiddi frá, hvssu trupult og stórt arbeiðið hevur verið. Serliga kemst hetta av, at føroyskt er eitt undantaksmál, har 60% av mállæruni eru fastar reglur, meðan írestandi 40% eru undantøk. So tað hevur verið múgvismikið arbeiði at fáa telduna at "skilja" alt hetta. Í hálvtfjórða ár, hevur verið arbeitt við skipanini.

– Hetta hevur verið ein sera kostnaðarmikil verkætlan, men vit hava megnað at goldið hvørjum sítt allatíðina. Hóast skipanin kann takast í nýtslu í hesum árinum, so verða enn útreiðslur eftir tað. M.a. ætla vit at stovna ein grunn, sum skal koma við rættingum og vegleiðingum til skipanina. Tað verða kanska har, at hesin kekkurin fer at muna. Men hetta er jú eitt hjálpartól, so kanska vit onkuntíð kunnu fáa vinning av tí eisini. T.d. kundu skúlar fingið sær føroyska teldutalu til lesuveiku næmingarnar, segði Karin Kass.

Hon torir ikki at nevna dagin, har skipanin verður liðug, men hon er vís í, at tað verður í ár.

# FHS, sum fjarlestur

**Møguleiki verður nú at taka FHS, sum er grundárið í Handilsskúlanum, via internet. Handilsskúlin á Kambsdali er fyrstur at veita hetta tilboð, og byrjað verður eftir summarfrítíðina**

FJARLESTUR
*Eydna Skaale*


*Páll Isholm, rektari, heldur tað vera alneyðugt, at føroyingar nú fara at taka kappingina um fjarlestratilboð upp við útlendingar*

– Fyrimunurin við hesi skipan er, at tú hvørki ert bundin av tíð ella staði, sigur Páll Isholm, rektari á Føroya Handilsskúla á Kambsdali. –Tú gongur í skúla har tú vilt, tá tað liggur best fyri hjá tær, tí alt fyrigongur um telduna. Vit vita, at áhugi er fyri skipanini, tí vit hava fingið onkrar fyrispurningar frá fólki, sum ikki fáa komið í skúla í vanligu skúlatíðunum. Við stuðli frá oljufeløgunum, fáa tey nú møguleikan, sigur Páll Isholm.

FHS, sum tekur 1 ár, tekur við fjarlestraskipanini 2 ár.

– Vit hava valt at leingja útbúgvingina við einum ári, tí tey, ið velja fjarlesturin, allarhelst eru upptikin av arbeiði, síðan tey ikki fáa komið í skúla um morgunin, greiðir Páll Isholm frá.

Lærugreinarnar verða býttar upp soleiðis, at fyrsta árið fer til tvungnu greinarnar: virkisbúskap, kunningartøkni, marknaðarførðslu og enskt. Hesar lærugreinarnar eru tær, ið eru best umtóktar á kvøldskúlanum, tí tær eru kravdar, um tú fert í handils- ella kontórlæru. Nú kunnu fólk so taka lærugreinarnar ímeðan tey arbeiða, og uttan at verða bundin at skúlanum ávís kvøld.

Seinna árið verður undirvíst í tveimum tvungnum greinum afturat: samfelagslæru og føroyskum og í vallærugreinunum, har serliga týkst og støddfrøði eru best umtóktar. Til ber eisini bert at taka einstakar lærugreinar.

Páll Isholm sigur, at málbólkarnir eru nógvir.

– Tey, ið búgva á útoyggjum og á Suðuroynni, kunnu nú nema sær útbúgving og samstundis verða verandi heima.

Fyri tey, ið ikki fáa komið vegna kroppslig brek, sosialar- ella arbeiðsumstøður, er hendan skipan eisini heilt greitt eitt framstig, sigur Páll.

Nógvir skipsmenn eru, sum lítið og einki hava at gera, meðan teir eru heima millum túrar. Teir kunnu nú taka FHS, meðan teir eru heima greiðir Páll Isholm frá. – Hetta er stutt sagt ein skúli fríur av tíð og stað, sigur hann.

– Undirvísingin fer fram við vanligu lærarunum, sum eisini undirvísa um dagin. Kunningartøknin ger hetta møguligt. Vit fara at knýta okkum til "Skulin.fo", sum er ein skipan hjá mentamálaráðnum, og sum nærum alt samskiftið millum næmingar og lærarar fer at ganga ígjøgnum. Vit hava tosað um at geva lærarunum telefontíð eisini, so næmingar kunnu ringja ávísar tíðir og spyrja um møgulig ivamál, sigur Páll Isholm.

Einar tvær ferðir hvørt hálvár er tó ætlanin at savna allar fjarlestranæmingarnar á skúlanum. Próvtøkan fer fram sum vanligt, saman við hinum næmigunum.

– Enn er alt ikki endaliga fastlagt. Men vit fara undir ítøkiligu fyrireikingarnar, so skjótt sum vit fáa staðfest tørvin, sigur hann.

Umsóknarfreistin til fjarlestur komandi ár er sett til 4. juni og upptøkutreytin er nøktandi 9. ella 10. floksprógv.